# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingur til avloysarastarv fyri deildarleiðara

Á G3 er eitt barnsburðarfarloyvisstarv fyri deildarleiðararan leyst at søkja til setan 1. juni 2008 ella eftir avtalu til og við 31. mars 2009.

Á G3 eru hesi medisinsku ambulatoriini: hæmodialysa, cardiologisk amb., onkologisk amb., hæm. amb., diabetes amb., nuclear med./lunga amb., maga/tarm amb., nefrologisk amb, viðgerðir fyri rheumatologiskar sjúkur og klinisk neuro fys. lab.

**Vit sóknast eftir einum**
sjúkrarøktarfrøðingi við drúgvum fakligum royndum innan medisinska viðgerð og røkt og við góðum samstarvsevnum. Deildarleiðarin skal virka fyri, at deildin virkar sum ein eind við best møguligari nýtslu av starvsfólkaorku og kanningarhølum til gagns fyri sjúklingin.

Ein partur av arbeiðsuppgávunum hjá deildarleiðaranum eru í klinikkini. Deildarleiðarin hevur innan tað sjúkrarøktarfakliga økið tilvísing til leiðandi sjúkrarøktarfrøðingin á medisinska deplinum.

G3 er opið hvønn yrkadag kl. 08.00 – 16.00. Harumframt hevur hæmodialysan opið leygardag og trý kvøld um vikuna.

**Deildarleiðarin hevur ábyrgd av**
- sjúkrarøktini
- klinisku arbeiðsuppgávunum
- tí dagligu leiðsluni á deildini
- fakligu menningini
- fíggjarstøðuni á deildini

**Vit kunnu bjóða**
- innleiðslu
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- positivt tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakliga menning
- fakliga kompetentar starsvfelagar

**Krøv til umsøkjarar**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- drúgvar fakligar royndir innan medisinska økið
- royndir í kliniskum arbeiði
- royndir og hug til leiðslu
- áhuga í fakligari menning av starvsfólkum
- visiónir, sjálvstøðug/ur og kreativ/ur í arbeiðinum

**Fyrimun** hava umsøkjarar, sum hava
- leiðsluútbúgving

Starvslýsing og fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Evu M. Holm, deildarleiðara á G3, lokal 6250, lsevamo@ls.fo ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 14. mai 2008 kl. 12.00**

## Avloysari til Sjúklingaskrivstovuna

Søkt verður eftir fulltíðar summarferiuavloysara frá 23. juni 2008 til og við 15. august 2008.

**Høvuðsuppgávur**
- samskifti við sjúklingar og avvarandi
- samstarv við deildir á Landssjúkrahúsinum og Sjúklingahotellið
- umsiting í smb. við sjúklingar, sum skulu uttanlands
- skráseting av innleggingarseðlum
- innkalling av sjúklingum

**Krøv til umsøkjaran**
- edv-førleika á brúkarastøði
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- førleika í føroyskum, donskum og enskum, bæði skrivliga og munnliga
- góð samstarvsevni og tænastusinni

Tað kann verða ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan Heilsuverkið

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Gudnu Midjord, ábyrgdarhavandi, lokal 1151, lsgudmi@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 13. mai 2008 kl. 12.00**

## Sjúkrarøktarfrøðingur til B6

Vegna barnsburð søkja vit eftir einum sjúkrarøktarfrøðingi fulla tíð í skiftandi vaktum til setan 1. juni 2008 ella eftir avtalu til og við 31. januar 2009. Møguleiki er fyri lægri brøki.

Á nýumvælda B6 er ein palliativ eind við tveimum einastovum. Aðrar áhugaverdar fakligar avbjóðingar liggja eisini fyri framman við implementering av THS (Talgild Heilsu Skipan).

B6 er ein medisinsk deild, sum tekur móti elektivum og akuttum vaksnum sjúklingum. Deildin hevur pláss fyri 15 sjúklingum og hevur hesar sergreinar: "gastroenterologi, neurologi, endokrinologi, palliatión og onkologi". Arbeitt verður eftir kontaktpersónsskipanini.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
- røkt og viðgerð til sjúklingar innan áðurnevdu sergreinar

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu

Fyrimunir hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Ingun Gaardbo, deildarleiðara á B6, lokal 6036, lsingga@ls.fo ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 14. mai 2008 kl. 12.00**

## Sjúkrarøktarfrøðingar til B7

Á B7 søkja vit eftir sjúkrarøktarfrøðingum til skiftandi vaktir á starvsbrøki 1,0 til setan 1. juni 2008 ella eftir avtalu. Møguleiki er fyri lægri brøki:
- 3 føst størv
- 1 avloysarastarv til og við 31. januar 2009

B7 er ein medisinsk deild, sum er nýumvæld. Deildin hevur hesar sergreinar: "lungamedisin, nefrologi, hæmatologi, apoplexi, rheumatologi og onkologi". Fakligmenning við undirvísing og skeiðvirksemi innan serøkini heldur fram. B7 er eisini byrjað við tvørfakligari konferansu hvønn morgun. Aðrar fakligar áhugaverdar avbjóðingar, sum liggja fyri framman, verður implementering av THS heystið 2008.

**Arbeisðuppgávur í høvuðsheitum**
- røkt og viðgerð til sjúklingar innan áðurnevndu sergreinar

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur við góðkendari autorisatión
- fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- innleiðslu

Fyrimun hava umsøkjarar við kliniskum royndun innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja 304500 til Jónu Augustinussen, deildarleiðara á B7, lokal 6067, lsjonau@ls.fo ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 14. mai 2008 kl. 12.00**

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo